# Útboð av útvarpssending

**Arbeiðsheiti:** Pressan
**Miðil:** Útvarp/heimasíða
**Hvat:** Ein vikulig útvarpssending í vetrarskránni 2019/20, t.e. frá 1. september 2019 til 1. juni 2020.
**Longd:** 55 minuttir.
**Innihald:** Áleið 25 minuttir frammanundan framleitt innihald og 30 minuttir beinleiðis kjak við skiftandi panelluttakarum.
**Staðseting:** Mentan, Kringvarp Føroya
**Redaktionel ábyrgd:** Mentan

## KRØV TIL TILBOÐSGEVARA

Journalistiska útbúgving. Minst trý ára royndir á eini tíðindaredaksjón. Royndir við útvarpsjournalistikki. Gott føroyskt mál, góða útvarpsrødd og gott innlit í føroyskan journalistikk.

**Lýsing:** Sendingin skal viðgera tíðindini í vikuni og týðandi rák í journalistikki. Stríðið millum journalistar, lobbyistar, spunasmiðir og politikarar um, hvør skal definera veruleikan er harðari enn nakrantíð áður. Lesarar, lurtarar og hyggjarar verða í dag undirdíktir í mótsigandi tíðindum, tíðindaskrivum, Facebook-notum og beinleiðis sendingum (Facebook Live, Youtube o.s.fr.). Tíðindamiðlar eru regluliga fyri atfinningum – bæði frá øðrum tíðindamiðlum og frá makthavarum, sum við sosialum miðlum í dag kunnu velja journalistar og miðlar frá, tí teir hava fleiri lesarar á egnum profilum, enn tíðindaportalar hava.

Verturin á sendingini skal við kønari, fakligari hond leiða lurtaran gjøgnum tíðindameldurin og avdúka vánaligan journalistikk, spuna, falstíðindi og marknaðarføring dulklødd sum tíðindi. Umframt sjálva útvarpssendingina skal tilboðsgevarin gera eitt reyp ella ein brellbita um komandi sendingina, sum kann sendast í 1-2 dagar frammanundan. Eisini skal ein stutt lýsing í teksti gerast av sendingini hesa vikuna, sum kann leggjast á sosialu miðlarnar.

## KRØV TIL TILBOÐIÐ

- Eina lýsing av hvussu tú kundi hugsað tær at lagt sendingina til rættis í mun til val av panellutakarum, val av evnum, samstarv við redaktør og leiklutin hjá vertinum.
- Eitt yvirlit yvir tínar royndir sum journalistur.

## KRINGVARP FØROYA VEITIR

- Upptøkuhøli
- Atgongd til savn
- Útgerð
- Ljóðtøkning
- Redaktør

KVF tilskilar sær rættin at leggja dent á yrkisføri og persónsmensku hjá verti og á veitingartrygd.

KVF tilskilar sær somuleiðis rættin at vraka øll innkomin tilboð.

Freistin at bjóða seg fram at gera sendingina er 1. juni 2019.

Umsókn skal sendast til Kára Sólstein, virkandi leiðara á Mentan, karisol@kvf.fo.

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýri við sjey limum stjórnar stovninum.
Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum.
Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting.